# Heimildir um seyðamjólking í Føroyum

*Eftir Arne Thorsteinsson*

Flest allar staðir har menn hava havt seyðabrúk, hevur tað havt til endamáls at framleiða ikki einans kjøt og ull, men eisini mjólk. Úr miðaldarkeldum (Kult. Leks. V, bls. 47—56) fæst at vita, at seyður tá hevur verið mjólkaður í øllum Norðurlondum, at kalla, og t. d. úr Íslandi og Noregi sæst, at hóast ærin bert mjólkar einar 90 pottar í allari mjólkitíðini juni-september, hevur seyðamjólkin ikki havt heilt lítlan týdning, tí ein lítil garður kundi hava úti við 200 mjólkær. Seyðamjólk, sum er sera feit, varð eins og neytamjólk nýtt til ost, smør ella skyr. Í Danmark og Skåne varð mjólkin oftast kókað og saltað og síðan latin súrna og kundi tá verða goymd einar 6 mánaðir. Heilt fram móti okkara øld varð seyður mjólkaður í Norðurlondum (Berg 1949), men so við og við hevur seyðamjólkin mist týdning sín, og siðurin at mjólka seyði tykist at hvørva í 19. øld.

Við hesum í huga er tað væl skiljandi, at hóast eingin í dag er førur fyri at geva beinleiðis upplýsingar um seyðamjólking í Føroyum, er tað vanlig hugsan, at áður í tíðini varð seyður mjólkaður eisini her:

»Annars er sjálvsagt mangt ólíkt nú og tá, — t. d. vóru ærnar yvirhøvur mjólkaðar í forðum, harav øll tey nógvu staðanøvn við »kvíggj« heiti í (Patursson 1925: 83). »Summi staðanøvn tykjast at vísa á, at bøndur í Føroyum hava nýtt selbrúk og seyðamjólk, hóast einki er beinleiðis varðveitt um hetta, hvørki í mannaminninum ella á annan hátt« (Rasmussen 1968: 30). »Ein søga sigur, at her hevði verið eitt kvíggj, eitt

tippi hvar tey róku ærnar saman at verða mjólkaðar, ein skikkur, sum fyrr í tíðini ikki var óvanligur«. (Hansen 1975: 120).

Henda uppfatan er vanlig at finna í føroyskari søguskriving, og endamálið við hesi grein er at kanna eftir, hvat henda uppfatan er grundað á, og gera eina metan av teimum heimildum, sum nýttar hava verið.

Í doktararitgerð síni um staðanøvn í Norðuroyggjum (Matras 1932: 6—7, 190—91, 208) nemur Christian Matras fleiri ferðir við spurningin um seyðamjólking. Vísandi til Svabo metir hann, at ein týdningur av staðanavnaliðinum kví(ggj) er »Samlings- og Malkeplads for Faar«, og gevur kvíggjanøvnum, sum finnast í illgongdum lendi í fjøllunum hesa merking, meðan somu nøvn, ið eru at finna nærindis bønum ella í bønum, verða hildin at hava samband við neytahald. Samstundis ger Christian Matras tó vart við, at einki kann sigast við vissu um, at seyður hevur verið mjólkaður í Føroyum áður í tíðini.

Daniel Bruun viðgerð eisini spurningin í ymsu skriftum sínum. Hann sigur frá, at seyður nú ikki verður mjólkaður í Føroyum, sum hann verður tað í Íslandi, og metir, at hetta hevur verið ógjørligt síðan 1659, tá seyðurin varð lagdur í fela (Bruun 1911: 614). Tó ivast hann ikki í, at seyður hevur verið mjólkaður í eldri tíðum. Hann vísir til, at frásagnir eru um hetta, og staðanavnaliðurin kvíggj má hava somu merking sum »*kvíar*« á íslendskum, ein lítil girðing at mjólka seyði í. Eisini endurgevur hann frá Svabo, at menn á hansara døgum kundu ávísa ta kvíggj, har Tróndur í Gøtu mjólkaði seyði sínum.

Sum tað skilst, vísir tann seinra granskingin aftur til Svabo sum høvuðskeldu til evnið. Tað Svabo í 1781—82 veit at greiða frá (Svabo 1959: 205—06), er tó ikki annað enn longu er endurgivið, at hann veit um frásagnir um seyðamjólking áður í tíðini, at orðið kvíggj merkir eitt stað, har ærnar vórðu mjólkaðar, og tað staðið, har Tróndur í Gøtu hevði kvíggj, verður ávíst. Eisini sigur hann frá, at ein kvíggj við vissu

hevur verið í Gerðum á Borðoynni. Á øðrum stað (bls. 236) nevnir Svabo, at 1/4 mk uttangarðs í Gerðum »skal være skyldsat, fordi der var et Kvujgj i gamle Dage«. Í orðabók síni (Svabo 1966: 460) hevur Svabo sum einastu merking av orðinum »Kvujgj«: »Sted i udmarken hvor man fordum malkede Faarene«.

Samtíðarmaður Svabos, presturin Jørgen Landt, nevnir at seyður verður ikki mjólkaður í Føroyum, tí hann er hálvvillur, og stór manning krevst at reka hann saman, men áður í tíðini skal seyðurin hava verið mjólkaður (Landt 1965: 204).

Fara vit nú longri aftur í tíðina til Lucas Debes í seinnu helvt av 17. øld, fáa vit aftur bart út at vita, at seyður verður ikki mjólkaður í Føroyum. »De malckis oc icke heller nogen Tjd effterdi de ere uhandelige formedelst deris Vildhed«, sigur Lucas Debes (Debes 1673: 122).

Eldri keldur enn Lucas Debes siga einki um seyðamjólking, men til eru eldri lýsingar av føroyskari seyðarøkt, sum óbeinleiðis upplýsa, um tað hevur verið gjørligt at mjólka seyði við tí røktingarhátti, sum hevur verið nýttur. Fleiri av teimum áður umrøddu høvundum hava gjørt vart við, at føroyski seyðurin er ov styggur at verða mjólkaður. Tað er eyðsæð, at skal tað bera til at mjólka ónum, mugu tær vera púra spakar, og seyðamjólking krevur tí ein øðrvísi røktingarhátt, enn tann, ið lýstur verður av Lucas Debes og yngri høvundum. Í Íslandi, har seyður enn varð mjólkaður fyrst í hesi øldini, varð allur seyðurin sum oftast havdur í seyðahúsi um veturin. Frá mánaðaskiftinum apríl-mai og til seyðurin um heystið varð tikin inn aftur, sótu tey um dagin hjá mjólkónum, sum gingu á beiti í haganum nærhendis húsum, og um náttina høvdu tey tær innibyrgdar (Bruun 1897: 53, Jónasson 1961: 170). Slíkar ær verða eyðvitað so spakar, at ein maður við hundi sínum kann halda skil á øllum fylginum.

Í Føroyalýsing síni, sum er skrivað í 1613—14 (*Storm* 1881: LXVI) skrivar Peder Claussøn Friis eitt sindur um seyðarøkt í Føroyum (Claussøn 1632: 149—50). Hann nevnir ikki mjólking, men lýsing hansara av føroysku seyðarøktini minnir so

nógv um tað, sum yngri høvundar skriva, og ta røkt, sum hevur verið kend í Føroyum fram til nútíðina, at vit mugu rokna við, at seyðurin á hansara døgum hevur verið ov styggur til at kunna verða mjólkaður. Sama kann verða sagt um lýsingina í handritinum »Om Norgis Rige« eftir Absalon Pedersen Beyer, sum varð skrivað í 1567, og er endurgivin av Jacob Jacobsen í Útiseta 1952 (Jacobsen 1952: 10). Báðir nevna slakt og ull, og so hetta at skal bóndin hava hendur á einum seyði, verður hann tikin við hundi.

Í tí røktingarhátti, sum verður lýstur síðan miðja 16. øld, er einki pláss fyri seyðamjólking. Eldri lýsingar eru ikki til, so hvussu seyðabrúkið hevur verið í miðøldini er mær vitandi ongantíð lýst. Og tó hava vit júst úr miðøldini ta týdningarmestu kelduna um føroyskt seyðabrúk, Seyðabrævið frá 1298. Mær vitandi hevur eingin roynt at greina tað, sum Seyðabrævið sigur um føroyska seyðarøkt í miðøldini, og tað verður eisini ov drúgført at gera í hesum sambandi, men eitt sindur skal tó verða gjørt burur úr tí.

Seyðabrævið varð í 1298 givið sum rættarbót til landslógina, sum annars hevur havt gildi í Føroyum (Seyðabrævið, 1971: 3). Orsøkin til, at neyðugt hevur verið at gera hesa rættarbót, man helst vera tann einfalda, at viðurskiftini í Føroyum í ávísum málum, serstakliga viðvíkjandi seyðarøkt, hava verið so ólík teimum í Noregi, at ikki bar til at hava somu lógarskipanir. Seyðabrævið eigur tí at kunna geva okkum álítandi upplýsingar um ta seyðarøkt, sum í 13. øld hevur verið í Føroyum serstakliga.

Í Seyðabrævinum finna vit fyriskipanir um at reka seyð, um seyðaskipan, um hvussu fram eigur at verða farið, tá lomb verða markað, um samgongu, um fremmandan seyð, sum kemur á rætt, um seyð, sum gongur í annars haga og verður hagfastur og um at halda rættir. Revsing verður ásett fyri hagagongd, fyri at marka í loynd og fyri hundar, ið bíta seyð. Eisini verður talað um hundatal, at taka seyð við hundi, um styggan seyð og um at spekja. Tað, sum í hesum sambandi hevur størsta týdning, er kanska ikki tað, at mjólkseyður

hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis verður umrøddur, men heldur at tann mynd, sum Seyðabrævið gevur av føroyskari seyðarøkt í 13. øld, tykist so vælkend. Tað er sami røktingarháttur, sum seinri verður lýstur, og sum er kendur fram til okkara øld. At so er, verður óivað eisini prógvað av tí, at fyriskipanirnar um seyðabrúk so at siga óbroyttar vóru í gildi heilt til 1866, og eisini í ein vissan mun eru tiknar við í nútíðar hagalóggávu.

Eldri keldur enn Seyðabrævið, sum umrøða føroyskt seyðabrúk, eru ikki til. Tó skal verða víst til, at C. Bærentsen heldur, at høvuðsinnihaldið í Seyðabrævinum er eldri føroyskar samtyktir og rættarsiðir (Bærentsen 1911: 3).

Samantikið vil eg meta, at skrivligu keldurnar sýna okkum ein røktingarhátt, har seyðamjólking ikki hevur verið gjørlig, og at seyðamjólking tískil hevur verið ókend í Føroyum síðan 13. øld í minsta lagi. Við hesum í huga kunnu vit royna at meta ta prógvførslu fyri seyðamjólking, sum í yngri tíðum hevur verið førd fram. Daniel Bruun hugsar sær, at menn kunna vera givnir við seyðamjólking í sambandi við felan, sum hann sigur vera fyriskipaðan í 1659. Hetta kann ikki vera rætt, tí kenning varð ikki avtikin fyrr enn 1698[1]), og vit hava orð Lucas Debesar í 1673 fyri, at seyður verður ikki mjólkaður tá. Heldur ikki varð forboðið móti kenning aktað serliga væl[2]), og í einbýttum høgum hevur tað als onga ávirkan havt. Um so var, at fyriskipanin frá 1698 hevði havt so álvarsligar fylgjur, at menn noyddust at gevast við einum elligomlum nýtsluhátti, mundi okkurt orð verið at funnið um tað í teimum mongu álitum og skrivum, sum finnast í sambandi við fyriskipanina (Bærentsen 1911: 63—72).

Svabo er, sum áður sagt, tann fyrsti at føra fram, at seyður

---

[1]) Forordning om Faar og Qvæg samt des Græsning og Vare-Tægt paa Færøe, 2. April 1698, Gr. 10. (Bærentsen 1911, bls. 61).

[2]) Reskript til Stiftsbefalingsmand over Island og Færøerne, Greve Rantzau, angaaende adskillige Poster til at hemme den imod Forordningen af 2. April 1698 dens 10. Artic i Svang gaaende skadelige Misbrug med de saakaldede Kendings-Søjd eller Faars Afskaffelse, 19. August 1757 (Bærentsen 1911, bls. 73).

hevur verið mjólkaður í Føroyum, og próvgrundir hansara, sum yngri høvundar eisini hava nýtt, eiga tí at verða nærri kannaðar. Fyrst nevnir Svabo frásagnir, men eingin frásøgn er endurgivin, tó at hann ger nógv burtur úr seyðamjólking annars, og ongar frásagnir eru uppskrivaðar eftir hansara tíð. Kanska hevur hann í veruleikanum ikki fleiri frásagnir enn tær báðar hann sipar til, tá hann nevnir kvíggina hjá Tróndi í Gøtu, og at ein kvíggj við vissu hevur verið á Gerðagarði. Frásagnir um Trónd í Gøtu, og støð, sum verða knýtt at honum, man illa bera til at nýta sum fullgóð søgulig prógv nú á døgum, og viðvíkjandi kvíggini á Gerðagarði tykist Svabo beinleiðis at fara skeivur. Christian Matras heldur, at Svabo her hugsar um Kvíingadal, har húsatoftir og aðrar fornleivdir enn eru at síggja, men fremri liðurin í navninum Kvíingadalur, hevur einki við orðið kvíggj at gera (Matras 1932: 6—7), og hansara frásøgn um, at markatalið uttangarðs er hækkað við $^1/_4$ mk, tí at har var kvíggj í gomlum døgum, kann bert metast sum ein uppgjørd greining.

Heldur ikki orðið kvíggj kann í sjálvum sær metast at hava nakað virði sum prógv. Orðið hevur mangar týdningar á føroyskum, eitt nú byrgi til kálvar, stað, har neyt liggja á bóli, díki, byrgi at reka fugl í o. a. (Jacobsen og Matras 1961: 238). Tann merking, Svabo gevur orðinum, tykist vera so sjáldsom, at ein kanska kann ivast í, um hon er til á føroyskum. Eingin tykist síðani at hava skrivað orðið upp við hesi merking, hon finst ikki í orðalistanum, sum Jakob Jacobsen gjørdi til anthologiina, t. d. (*Hammershaimb* 1891: 164). Tað einasta, sum kanska kann styðja Svabo er ein støk kvæðaregla (?) »hann rak síni (!) smalu til kvíggjar«, sum Jakob Jakobsen hevur skrivað upp.[3])

Próvførsla Svabos fyri, at føroyingar hava mjólkað seyði áður í tíðini tykist ógvuliga veik, og tað styrkir ikki um støðu hansara, tá kannað verður eftir, hvat hann nýtir søgugreining sína til. Tað, hann sigur um seyðamjólking áður í tíðini,

[3]) Lummabók III, á Landsbókasavninum.




1. mynd. *Kvíar, Ísland, eftir Daniel Bruun.*

stendur sum inngangur til eina deild, har hann roynir at elva føroyingum til at fara at mjólka seyði, so hann hevur havt sínar góðu grundir til at royna at ávísa, at hetta hava føroyingar gjørt fyrr.

Tískil meti eg ikki, at tað í dag finst nakað prógv fyri, at seyður nakrantíð hevur verið mjólkaður í Føroyum, og eg meti, at hann hevur í hvussu er ikki verið mjólkaður síðan 13. øld.[4]) Hvussu verið hevur í uppaftur eldri tíð, er ikki gjørligt at siga nakað um á tí grundarlag, sum her er nýtt. Men tað

[4]) Alexander Fenton sigur í brævi 15. 2. 1977, at heldur ikki úr Hetlandi og Orknoyggjum tykjast heimildir at vera fyri seyðamjólking, men tó aðra staðir í skotsku oyggjunum, eitt nú St. Kilda.




2. mynd. *Stekkur við taktari lambakró, Ísland, eftir Daniel Bruun.*




3. mynd. *Stekkur við lambakró, Ísland, eftir Daniel Bruun.*

hevði ikki verið órímiligt at hugsað sær, at landnámsmenn hava kent til at mjólka seyði heimanífrá og eisini hava gjørt tað her, men at viðurskiftini í Føroyum onkursvegna hava fingið teir at gevast rættiliga tíðliga í tíðini. Prógv fyri hesum finst tó einki og fæst neyvan heldur uttan so, at vit beinleiðis kunna ávísa girðingar, sum uttan nakran iva hava samband við seyðamjólking. Í Íslandi (Bruun 1897: 53—63) vórðu ærnar vanliga mjólkaðar í *kvíum*, ein avlong, ferhyrnt girðing (1. mynd), sum átti at vera so trong, at ærnar fingu ikki flutt seg, meðan tær vóru mjólkaðar. Um náttina vóru ærnar havdar í eini rúmligari girðing, *stekkur*, ið hevði eitt lítið avrúm, *lambakró* (2.-3. mynd), sum viðhvørt var takt. Í hetta avrúmið, vórðu lombini sett um náttina, so tey ikki fingu sogið, áðrenn ærnar vórðu mjólkaðar um morgunin. Eftir at lombini og hin seyðurin síðst í juni mánaði vórðu rikin til fjals, vóru bert mjólkærnar havdar eftir. Viðhvørt vóru ærnar um náttina havdar í eini stórari, rundari girðing, *nátthagi* (4. mynd), har tær fingu bitið. Um girðingar, ið líkjast hesum íslendsku, eru at finna í Føroyum, eigur málið at verða tikið upp til viðgerðar av nýggjum, men møgulig minni um seyðamjólking eiga at verða funnin, har fólk hava búð ella havt ærgi; ikki í illgongdum, fjarskotnum lendi, sum Christian Matras hugsar sær tað.



4. mynd. *Nátthagi, Ísland, eftir Daniel Bruun.*

Bert fornminnaskrásetingar kunnu geva okkum tað neyðuga tilfarið í hendur, og henda grein skal fyrst av øllum skiljast sum fyrireiking til komandi skrásetingar Fornminnissavnsins, ið eyðsýniliga eisini eiga at umfata gomul minni um seyðarøkt og annan búskap í Føroyum.

## BÓKMENTIR


*Berg, Gösta:* Fåret som mjölkdjur. Rig 1949.

*Bruun, Daniel:* Fortidsminder og Nutidshjem paa Island. København 1897.

*Bruun, Daniel:* Fra de færøske Bygder. Í Tillæg til Forslag og Betænkninger afgivne af den færøske Landbokommission. København 1911.

*Bærentsen, C:* Ældre Love og Bestemmelser om Landboforhold paa Færøerne. Í Tillæg til Forslag og Betænkninger afgivne af Den færøske Landbokommission. København 1911.

*Claussøn, Peder:* Norriges oc Omliggende Øers Sandfærdige Beschriffuelse. Kiøbenhaffn 1632.

*Debes, Lucas:* Færøernes Beskrivelse. Kiøbenhafn 1673.

*Hammershaimb, V. U.:* Færøsk Anthologi II, Ordsamling. København 1891.

*Hansen, J. Símun:* Tey byggja Land, 3. partur, Viðareiðis sókn. Klaksvík 1975.

*Jakob Jakobsen:* Absalon Pederssøn Beyer, Útiseti VII, 1952.

*Jacobsen, M. A.* og *Matras, Chr.:* Føroysk donsk orðabók. Tórshavn 1961.

*Jónasson, Jónas:* Íslenzkir Þjóðhættir. Reykjavík 1961.

*Kulturhistorisk Leksikon for nordisk middelalder,* Bind V. København 1960.

*Landt, Jørgen:* Forsøg til en Beskrivelse over Færøerne. København 1800. Nýútg. Tórshavn 1965.
*Matras, Chr.:* Stednavne paa de færøske Norðuroyar. Aarbøger for nordisk Oldkyndighed og Historie, 1932.
*Patursson, Jóannes:* Vinnuvegabøtur. Varðin, 5. bind, 1925.
*Rasmussen, Holger:* Føroysk Fólkamenning. Keypmannahavn 1968.
*Seyðabrævið,* Tórshavn 1971.
*Storm, Gustav:* Samlede skrifter af Peder Claussøn Friis. Kristiania 1881.
*Svabo, J. C.:* Dictionarium Færoense I. København 1966.
*Svabo, J. Chr.:* Indberetninger fra en Rejse i Færøe 1781 og 1782. København 1959.

## SUMMARY

Sources on Sheep-Milking in the Faroes.

In modern historical treatises one frequently encounters the postulate that it has been the practice to milk sheep in the Faroes in the past. However, on reference to the source material it becomes clear that sheep-milking has definitely not been practised since circa 1600. Furthermore, on examination of the *Seyðabrævið* of 1298, a special enactment for the Faroes mainly concerning sheep-breeding, it emerges that the structure of sheep-breeding in the 13th century was appreciably the same as deschribed in later times, and in that structure there was no place for sheep-milking (i. e. because of the poor domesticity of the sheep).

The postulate, first stated by J. C. Svabo in 1782, was based on vague, unrecorded traditions and undocumented explanations of the place-name element *kví(ggj).*

If sheep-milking has ever been practised in the Faroes, and that possibility during the earliest phases of settlement cannot be here dismissed, it will only be documented by archæological means and through a survey of the structures comparable to other structures which are definitely known to have existed in sheep-milking contexts in other countries. This must be the next avenue of investigation towards a final solution to this problem.